Jól í frumskóginum:

# Ynkstu okkum at síggja ein tikara…



**Sjey føroyingar hildu jól í Royal Chitwan National parkini í Nepal**

NEPAL
*Nina Brockie*

Fyri ein og hvønn eru jólini nakað heilt serligt. Men fyri Tommy Petersen, Maju Larsen og døtrar teirra, Liv og Gyðju á Argjahøvda og vinfolk teirra Irdi Neshamar, Ninu Brockie og útisetarnar, Jan á Argjaboða og Torgunn Kragesten, skuldu hesi jólini verða eini ógloymandi. Tey høvdu avgjørt at halda jól á ein heilt óvanligan hátt. Nevnliga í frumskóginum, ið nevnist Royal Chitwan National Park. Familjan Petersen hevur búð í nærum hálvtriðja ár í Nepal, meðan Jan og Torgunn fluttu til Kathmandu fyri mánaðum síðani. Og hóast frumskógurin ikki er so langt heiman í frá, er ein slík útferð ikki gerðandiskostur.

## Ferðin til Chitwan

Tíðliga lítla jólaaftan varð lagt avstað. Fyri at koma til frumskógin varð fyrst og fremst neyðugt at koma út úr krókuta Kathmandudalinum. Og tað var ikki bara at siga tað, tí at ferðslan er mikil, og ein varð heppin at hitta folk, ið dugdi at halda ferðslulógina í Nepal. So torført kundi tað tykast at koma fram. Men eftir at hava koyrt í nakrar tímar avgjørdu vit at steðga og siggja Devghat, har ið bilførarin hjá Tommy var blivin fráhaldsmadur. Dev merkir »Gud« og ghat merkir »har ið áirnar møtast«. Hetta er ein heilagur staður, har ið nógvir nepalesar koma til at liva sinar seinastu dagar. Fólkini vóru sera blíð og tóku væl ímóti ferðafolki. Nógv bleiv gjørt burtur úr, og øll fingu »Tika« (bletturin á pannuni) frá einum guru, ið sat við templi. Sjalvandi vantaði hann at faa eitt oyra afturfyri. Síðani helt ferðin áfram.

## Móttikin av einum majori

Tá ið vit vóru komin so langt, ið til bar við egnum bili, vóru fólk frá Tiger Tops og tóku ímóti okkum. Sjálvur hægsti maðurin, Majorurin, tók væl ímóti fólki og bjóðaði okkum upp í stóru jeeparnar, sum skuldu føra okkum víðari inn í frumskógin har vit skuldu gista. So skjótt vit settu fotin i jeepin, fekk ein ferðil av, at nu var safarian byrjað, og spent vóru vit øll.

## Langt inn i skógin

Tað kendist sum ævir áðrenn vit komu inn har, ið vit skuldu gista. Og tann sjon, ið møtti okkum, tá ið vit komu innar i skógin. Tað var sum drigið úr søguni um Tarzan. Trøini á leiðini og fuglar í alskins litum, í teimum, ja eitt satt ævintyr. Væl bleiv tikið ímóti fólki. Men vit fingu ikki meiri enn høvi at skifta klæðir, so skuldu vit uppliva okkara fyrstu safari á fílabaki. Hendan ferðin var tveir tímar long og spennandi, so troytt, svong og eym í endanum komu vit heilskapað heimaftur. Dagurin hevði verið langur, og fólk vildu bara i kulluna.

## Endiliga jólaaftan

Sum smábørn høvdu vit glett okkum til henda dag. Vit skuldu byrja við einum ríðitúri á fílunum. Sjálvandi ynsktu vit okkum í jólagávu at sleppa at síggja ein tikara. Okkum varð sagt, at ein var heppin um tað tókst. Ein blaðmaður, ið skrivaði greinar um tikarar, hevdi búð tríggjar vikur hjá Tiger Tops bert fyri at síggja ein tikara, og ikki hevði tað eydnast honum. Mundi tað fara at eydnast okkum? Tað hevdi verið TANN besta jólagavan. Men nei, vit sóu alt annað. Apur, nashyrningar, dádyr, ørnir og krokodillur, men ongan tikara.

Um kvøldið hildu vit jól. Tað skuldi verða so nær tí vit kendu heimani í fra. Við rís á la mande, jólaevangliið og fyri Gyðju, dansin um jólatræið. Vit høvdu eitt lítið seymað jólatræ við út. Vit skuldu sita á kamarinum og halda jól. Træið stóð so fitt á borðinum og undir tí allar jólagávurnar. Eftir at hava etið, dansað og pakkað upp var bert eitt at gera – fyrireika seg til fyrsta jóladag i frumskóginum.

## Ovanliga heppin

So kom tann dagurin, vit gingu og droymdu um. Vit sáu nakað heldur ovanligt.

Vit høvdu verið tann vanliga filabaks-turin, og seinnapartin skuldu vit so á ein sokallaðan »jeepsafaritúr«. Hetta var í einum opnum jeepi, so vit sótu har øll so væl ballað í ullint pashmina teppi. Tað sýntist, sum um vit koyrdu og koyrdu og einki sóu, men so burtur úr ongum kom ein bjørn. Ferðaleiðarin segði, at hetta var tann fyrsta, hann hevði sæð í ár. So vit vóru glað og ikki longur kedd um, at vit ongan tikara høvdu sæð. Men, men á leiðini heim hittu vit hana. Tað var ein stór tikarahon, ið kom fram úr trøunum og gekk beint ímóti okkum. Øll voru púra frá sær sjalvum av spenningi, men samstundis vóru vit noydd at binda frið fyri ikki at styggja hana burtur.

Hon gekk pura rólig beint ímóti okkum. Hugdi upp á okkum, tevjaði upp í luftina, sum um hon visti, at har var okkurt, ið hon kundi fáa sær til matna. Tá ið hon var uml. tríggjar metrar frá okkum, meinti ferðaleiðarin, at hon var alt ov nær, so vit startaðu bilin, so tikarin brávendi út í trøini.

Tá hildu vit, at vit høvdu sæð tað seinasta av henni. Vit koyrdu bilin fram, og vit voru ikki meiri enn beint steðgað, tá hon kom undan aftur aftan fyri bilin og gekk víðari, sum um einki var hent.

Tevjaði, vendi sær á og hugdi at okkum og gekk líkasæl víðari. Ferðaleiðarin segði okkum, at ofta gingu tikararnir á vegnum, tí at tað var lættari enn at ganga í manshøga fílagrasinum.

Nú kundu vit venda nøsini móti Kathmandu aftur. Vit høvdu fingið okkara jólagavuynski.

## Eitt sindur um Royal Chitwan National Parkina

Umleið 120 km úr Kathmandu liggur ein hin kendasta tjóðarparkin i Nepal. Chitwan liggur sunnan fyri býin, Narayngadh, og hevur eitt tað ríkasta djóralívið í allari Asiu. Áirnar, Rapti og Narayani, liggja sum mark á norðara endanum av parkini.

Til og við 1950 var loyvt at veiða øll djór í parkini og serliga var tað kongurin í Nepal, ið tók vinir sínar út hagar til at skjóta tikarar, nashyrningar og mong onnur djór.

Síðani varð roynt at vinna á malariu í fimmti og sekstiárunum, og mørkini vórðu opnað fyri indarum og ættum úr fjøllunum norðanfyri. Samstundis vórðu djórini noydd at flýggja til útjaðaran av plantasjuni. Í 1963 bleiv so eitt øki friðað, og í 1973 bleiv frumskógurin at enda gjørdur til eina tjóðarpark fyri soleiðis at bjarga teimum seinastu tikarum og nashyrningum í Nepal. Menniskjuni, ið høvdu sett búgv har, fingu hvør sín lut av jørðini uttan fyri plantasjuna.

Parkin er uml. 932 km². Størsti parturin er skógur, og ein partur liggur i Churi fjøllunum, sum í støðum kemur upp í 800 metra hædd. Men har sum føroysku familjurnar skuldu halda til var í láglendinum.





# Ósemjan skuldi ikki breiða seg

**Viðmerkingar til Jákup Petersen, yvirlækna í greinini hósdagin 3. januar 2002 undir heitinum neyðtøka av Landssjúkrahúsinum**

*Sjúkrahúsleiðslan*
Jóanis Erik Køtlum
Marin Vang
Anne Grethe Mikkelsen



Sjúkrahúsleiðslan vil fyri tað fyrsta siga at vit fyri ein stóran part eru samd við tí, sum stendur í greinini og tí eisini halda at hon er við til at seta málið viðvíkjandi B6 í rætta perspektiv. Tó hava vit mett tað neyðugt at koma við nøkrum viðmerkingum og svarum til einstøk punkt í greinini, eisini fyri at nýta høvi til at greiða frá okkara sjónarmiðum í hesum máli, sum hevur fingið drúgva viðgerð í fjølmiðlunum.

## Semjan

Orsøkin til at sjúkrahúsleiðslan avgjørdi, at gera eina semju við sjúkrasystrarnar á B6, var einans fyri at deildin kundi lata uppaftur 7. januar við kvalifiseraðum starvsfólki, soleiðis at borgarnir kundu fáa tað heilsutænastu, hann hevur krav uppá.

Alternativið var, at standa fast, við tí í væntu, at Landssjúkrahúsið kom at mangla seingjapláss 7. januar 2002 og við møguleika fyri, at ósemjan kundi spreiða seg til aðrar deildir sum óivað vildu blivið meira tyngdar av arbeiði.

Semjan er soljóðandi:

*Til*
*Sjúkrasystrafelag Føroya*

Vísandi til semingsroyndina ímillum Sjúkrasystrafelag Føroya og leiðsluna á Landssjúkrahúsinum 28. desember 2001 hevur leiðslan á Landssjúkrahúsinum avgjørt, at ganga við til fylgjandi krøv frá sjúkrasystrunum á B6, soleiðis at deildin kann lata uppaftur, sum ætlað, 7. Januar 2002.:

1. At leggja pening afturat lønarjáttanini, svarandi til 1,8 sjúkrassystir, tíðaravmarkað til 6 mánaðir, í samband við umstruktureringar á medisinska deplinum.
2. Tær 18 sjúkrasystrarnar hava møguleika fyri skrivliga, at taka uppsøgnirnar aftur inna 31. desember 2001 kl. 16.00, og kunnu halda áfram í starvinum við óbroyttum setunarviðurskiftum. Skrivini skulu avleverast í postkassan hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum.
3. Sjúkrahúsleiðslan ger, saman við medisinsku depilsleiðsluni, eina stutttíðarætlan yvir útskifting av hjálpiamboðum.

*sjúkrahúsleiðslan*

## Kollektiva uppsøgnin

Leiðslan kundi valgt at roynt málið víðvíkjandi uppsøgnunum í rættinum, tí at talan møguliga er um eitt kollektivt kampstig, sum er ólógligt. Hetta var ikki gjørt m.a. tí hetta krevur drúgva prógvførslu og tí at skotbráið, at fáa deildina mannaða aftur var stutt.

*Framhald á síðu 26*

Starvsfólk til Kundadepilin á Føroya Tele

"Tann, sum heldur, at hann hevur lagt útbúgving afturum seg, er farin meira afturum, enn hann er útbúgvin."
Poul Jørgensen



Søkt verður eftir fólki til Kundadepilin

Í Kundadeplinum verða allar telefontænastur á Føroya Tele avgreiddar. Í januar 2002 er ætlanin at seta á stovn ein kundadepil, sum hevur førleikar innan avrokning, skráseting, internetsupport og tekniska kundasupport. Við hesum vil kundin merkja, at tað er lættari at koma í samband við Føroya Tele og harvið fáa eina góða viðgerð.

Til bólkin søkja vit eftir fólki. Vit koma í fyrstu atløgu serliga at leggja dent á at menna førleikar innan hjálp til internetnýtslu hjá kundum. Tey, sum sett verða, skulu verða til reiðar at gjøgnumganga eina innanhýsis útbúgving og luttaka í kundatænastu innan øll øki.

**Umsøkjararnir skulu:**
- vera fyrikomandi
- vera ágrýtnir og næmir
- duga at laga seg eftir umstøðum, sum broytast
- kunna undirvísa starvsfeløgum

**Vit vænta, at teir hava:**
- góðan teldukunnleika
- førleikar innan uppseting og tillaging av teldum
- førleikar innan internet, bæði á brúkarastøði, men eisini skilja tøknina aftanfyri
- góðan málkunnleika – munnligt føroyskt, skandinaviskt og enskt
- royndir við kundaavgreiðslu
- hug at læra og at læra av sær
- evni at samstarva

Fólk við útbúgving innan edv kunnu hava fyrimun. Hinvegin vilja fólk, sum annaðhvørt gjøgnum útbúgving ella av øðrum royndum hava gott menniskjainnlit - duga væl við kundum - vera áhugaverd.

**Vit bjóða:**
- innanhýsis útbúgving
- arbeiðsøki í stórari framgongd
- arbeiðsøki har menningin gongur sera skjótt

Størvini verða at seta skjótast gjørligt og vera lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Eftir nýggjár letur Føroya Tele upp egnan integreraðan dagstovn í samstarv við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framihjárætt til ansingarpláss.

Hevur hetta tín áhuga og ynskir tú at hoyra nærri um starvið, kanst tú venda tær til Aksel Haraldsen, depilsleiðara ella Tummas Simonsen, bólkaleiðara, tlf. 303030.

Umsóknir skulu verða Starvsfólkadeildini hjá Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 21. januar 2002 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krav til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!